## Ísland sleppur lættari

Danska blaðið Politiken skrivar í dag, at íslendska bankaskrædlið verður ikki so dýrt fyri teir íslendsku skattaborgararnar sum higartil hildið. Blaðið vísir á, at Icesave er partur av trotabúnum eftir Landsbankan, sum íslendska ríkið yvirtók á heysti í 2008, og sambært blaðnum hevur tað víst seg, at tað eru so nógvir pengar í trotabúnum, at tað kann rinda næstan 90 prosent av tí, sum Icesave skyldar. Ein talsmaður fyri trotabúgvið sigur við Politiken, at altjóða grannskoðarar og ráðgevar hava kannað tølini og siga tey vera røtt.



## Eingin lodnuveiði

Um ársskiftið gjørdi íslendski havrannsóknarstovnurin nakrar lodnukanningar, og eftir tilmæli frá stovninum hevur fiskimálaráðið nú boðað frá, at sum er verður eingin kvotað útlutað, tí ov lítið er at síggja. Útrokningar hjá havrannsóknarstovninum vísa, at stovnurin er um 360.000 tons. Av hesum er gýtingarstovnurin 355.000 tons, og tann størri helmingurin av honum stóð úti fyri Eysturlandinum. Reglurnar um lodnuveiði siga, at gýtingarstovnurin skal vera minst 400.000 tons, áðrenn veiðast kann av honum. Tí er ikki grundarlag fyri veiði enn.

# Svínoyingar ótolnast eftir Rituni

**Síðan august hevur Súlan røkt siglingina til Fugloyar og Svínoyar. Skipið er so illa egnað, at fá fólk tora við. Strandferðslan hevur bara ikki annað skip, men streingjast skal á at fáa Ternuna umvælda, so Ritan kann sigla í Norðoyggjum**

SAMFERÐSLA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Seinasta summar, dagin fyri sum siglingarloyvið hjá strandfaraskipinum Másanum gekk út, fór Másin suður til Vágs, og har liggur hann enn.

Síðan august hevur plastbáturin Súlan, sum áður sigldi til Mykinesar, settur í siglingina úr Hvannasundi til Fugloyar og Svínoyar.

Súlan er als ikki egnað til hesa sigling. Hetta hevur fyrrverandi skiparin á Másanum, Jógvan Páll Poulsen, meira enn eina ferð víst á.

Og nú Súlan hevur verið álitið hjá fugloyingum og svínoyingum í næstan hálvt ár, eru í hvussu er svínoyingar við at missa tolið. Teir vilja hava Rituna noður ongantíð ov skjótt, og teimum dámar lítið at hoyra, at Ritan kanska ikki kemur fyrr enn í juni.

– Vit vóru von við, at Másin ikki sigldi, tá ið ókyrt var, men Súlan noyðist mangan at avlýsa, sjálvt um tað er kyrt, sigur Jógvan Edmund á Geilini, sum javnan ferðast um Svínoyarfjørð.

Hann veit, at fleiri fólk als ikki fara til Svínoyar at vitja, tí tey tora ikki at sigla við Súluni.

– Og menninir, sum sigla við, avlýsa ofta, tí teir heldur ikki tora, sigur Jógvan Edmund á Geilini.



*Súlan er als ikki egnað at sigla í Svínoyarfirði og í Fugloyarfirði, eru øll samd um*

### Nógvur gangur

Atfinningarnar móti Súluni eru, at báturin er so óróligur í sjónum, trampar og rullar illa, og tað ger tað ikki betri, at salongin er heilt har frammi.

Og so er tað allur gangurin.

Máld eru 105 dB, og ongastaðni umborð undir 90 dB.

– Tað er løgið, at eitt slíkt skip fær loyvi at sigla við ferðafólki. Og sum heild vil eg siga, at so vánalig viðurskifti hava vit ikki havt í fleiri ártíggju, sigur Jógvan Edmund á Geilini.

Hann heldur tænastuna vera so vánaliga, at Strandferðslan átti ikki at komt sær at tikið pening frá fólki fyri at sleppa at sigla við.

Bogi Mortensen, stjóri á Strandferðsluni veit væl um trupulleikan, men beint nú hevur Strandferðslan ikki annað skip at seta í siglingina.

Ætlanin hevur leingi verið, at tá ið strandfaraskipið Ternan er umvæld og umbygd, skal hon røkja nólsoyarsiglingina, men ikki fyrr enn tað kann Ritan fara í Norðoyggjar. Ritan skal eisini hava onkrar umvælingar.

Hósdagin verða tilboðini ipp á umvælingarnar av skipunum báðum latin upp.

Bogi Mortensen sigur, at tá ið veljast skal millum tilboðini, fer tíðin heilt vist at telja við.

## 62 skúlar stongdu í fjør

**Noreg:** - Ein harmilig gongd, staðfestir Torodd Fagerheim í “Landslaget for nærmiljøskoler” við norska blaðið Nationen.

Hann og onnur norsk skúlafólk kundu í fjør bert skráseta, at 62 skúlar noyddust at streingja, flestu teirra smáir kommunalir barnaskúlar.

Sambært Torodd Fagerheim økist talið bara ár undan ári. Síðani 1986 eru 1000 skúlar færri í Noregi.

Tað eru serliga teir kommunalu barnaskúlarnir við færri enn 100 næmingum sum verða raktir, men talið av ungdómsskúlum er eisini fækkað í fjør.

Hóast fleiri smærri skúlar eru niðurlagdir, hava framvegis 32 prosent av øllum grundskúlunum í landinum færri enn 100 næmingar. 27 prosent hava omanfyri 300 næmingar.

Orsøkin til stóru afturgongdina er hin einfalda, at tað verða niðurlagdir fleiri skúlar, enn tað verða bygdir nýggir. Umsitingingarligar broytingar og samanleggingar merkja eisini færri barnaskúlar.

Í oktober mánaði í fjør vóru 614.000 næmingar í norsku gundskúlunum. Í Nordland minkaði talið við 420, meðan tað økti við 1100 næmingum í Oslo.



## Alternativan tyrlupall í Mykinesi

Um summarið er einfalt og ómakaleyst at ferðast úr Sørvági og út í Mykines. Men um veturin gerst hetta einans við tyrluni hjá Atlantsflogi.

Ætlanin er nú, sambært Suna Jacobsen, borgarstjóra í Sørvági og sum eisini umfatar Mykines, at bøta um møguleikarnar hjá tyrluni at seta seg í oynni.

Sum skilst á honum hevur Landsverk játtað at gera eina ætlan um ein alternativan tyrlupall í oynni.

Annars hevur kommunan umsóknir liggjandi inni um ymiskar ábøtur í Mykinesi.

**sb.**

*Tyrlan er álitið hjá mykinesfólki umveturin*